## Tikin fyri rúsdrekkakoyring

Sunnumorgunin um hálvgum trýtíðina varð ein bilførari tikin í Kollafirði. Hann var rúsaður og verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Seinni sunnumorgunin var ein ungur drongur dottin á síni knallert. Talan var um ein 17 ára gamlan drong, sum hevði sett seg á knallert sína, hóast hann ikki var koyriførur. Drongurin varð fluttur á Landssjúkrahúsið til kanningar.

-sae-

## Eldsbrunar

Seinnapartin sunnudagin fekk alarmsentralurin eina fráboðan um royk á Argjum. Ein maður ringdi inn og boðaði frá, at hann sá nógvan royk tætt við verkstaðin Vón á Argjum. Men tað gekk bara ein lítil løta, so ringdi sami maður aftur og boðaði frá, at talan ikki var um eld kortini.

Eini hús í Folagerði í Havn fingu nakað av eld og roykskaða eftir, at eldur kom í tey leygardagin. Eldurin kyknaði orsakað av einum ovurhitaðum brenniovni.

-sae-

## Stjól pengar í vertshúsinum

Eitt av viðskiftafólkunum í vertshúsinum leygarkvøldið sá sær ein gyltan møguleika til at útvega sær pengar og okkurt at drekka, tá onki starvsfólk stóð við kassan eina løtu.

Starvsfólkið var farið uppá eini ørindi, og tá viðkomandi kom aftur til kassan manglaðu einar 1.500 krónur í kassanum. Starvsfólkið varnaðist eisini, at onkur hevði verið handan diskin og fingið sær eitthvørt at drekka.

Tjóvurin varð funnin inni á wc-inum, har starvsfólk hildu honum, inntil løgreglan kom á staðið. Hann hevði pengar uppi á sær og viðgekk, hvat hann hevði gjørt beinanvegin.

Maðurin verður nú ákærdur fyri stuldur av ákæruvaldinum.

-sae-

## Herverk við kirkjugarð

Herverk varð framt á bygningarnar við kirkjugarðin úti í Grøv leygarkvøldið. Nakrir rútar vórðu knústir. Løgreglan hevur kannað málið, men stendur á berum og veit onki, um hvør kann hava framt herverkið.

Løgreglan sigur, at tað vóru heilt nógv fólk úti leygarkvøldið, men ikki ófriðarligt kortini. Hóast tað tó hava verið nógv smáttaríir um vikuskifti.

– Full fólk, sum órógva, full fólk, sum vóru fallin frá í býnum og onkur heilt smá ferðsluóhapp, verður sagt av løgreglustøðini í Klaksvík.

-sae-

## Tveir ólógligir bilførarar

Løgreglan í Eysturoynni sigur frá einum stak friðarligum vikuskifti. Nógv fólk var kortini í býnum. Eitt nú í Fuglafirði, har Gunnar Mikkelsen framførdi, var nógv fólk.

Men um tíggjutíðina leygarkvøldið tók løgreglan ein bilførara á Glyvrum, sum koyrdi ávirkaður av rúsdrekka.

Og einar tveir tímar seinni tóku teir ein anna bilførara, sum tó ikki var ávirkaður. Men hann hevði onki koyrikort, so hann fær eina bót fyri tað.

-sae-

## Koyrdi ov skjótt

Løgreglan gjørdi ferðmátingar á Hjalla sunnudagin. Tá tóku teir ein bilførara, sum koyrdi ov skjótt.

Frá løgregluni verður sagt, at bilurin koyrdi 111 km/t, so hann fór júst upp um ferðmarkið.

Sunnumorgunin tók løgreglan í høvuðsstaðnum eisini ein mann upp á gøtuni, sum var avdottin. Hann varð tikin inn á støðina at sova rúsin av sær. Og í klubbagarðinum var eitt lítið rok sunnumorgunin, men tá løgreglan kom á staðið høvdu menninir funnið út av tí sjálvir. Har verður ongin sak burturúr, sigur løgreglan.

-sae-



*Havsbrún fekk nakað av skaða, tá hann sigldi á Galvin á Kalsoynni tíðliga leygarmorgunin*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Havsbrún sigldi á land

**Leygarmorgunin sigldi línubáturin Havsbrún á land**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Stutt fyri klokkan seks leygarmorgunin fekk Tórshavn Radio uppkall frá línubátinum Havsbrún, at hann hevði siglt á land, á Galvin á Kalsoynni.

Skipið stóð á landi, og bjargingarbáturin varð útsettur, um so var, at brúk bleiv fyri honum. Men tað var tað ikki, tí um sekstíðina leygarmorgunin boðaði Havsbrún frá, at skipið var komið av aftur í øllum góðum, og fingu teir sjálvir siglt til Klaksvíkar, har tey vóru um sjeytíðina. Báturin fór á beding, har skaðin varð umvældur.

Sjóbjargingarstøðin boðaði Norðoya Bjargingarfelag frá, og fóru teir beinanvegin til hjálpar við bátinum Sannu úr Klaksvík.

Tórshavn Radio rópti á skip og bátar nærhendis um at fara til hjálpar, og Hánni sum júst var farin úr Klaksvík fór eisini til hjálpar.

Sjóverjuskipið Tjaldrið sum var statt norðanfyri setti kós móti Havsbrún og bjargingartyrlan varð biðin um at vera til reiðar.

# Klaksvíkar kommuna í verkætlan um handilsmiðdepil

**Á afturlatnum býráðsfundi seinasta týskvøld samtykti Klaksvíkar býráð at fara inn í verkætlanina um at gera ein handilsmiðdepil í Klaksvík. Ein íløga sum skjótt kann koma at liggja upp móti 20 milliónum krónum**

VERKÆTLAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Klaksvíkar býráð fer upp í ætlanina um at gera handilsmiðdepil í Klaksvík. Kommunan fer at gera ein parkeringskjallara í verkætlanini, sum tá hon er liðug, kemur at liggja um einar 90 milliónir krónur. Parturin hjá kommununi fer at verða um 20 milliónir krónur*

**Klaksvík:**
Ætlanin um at gera ein handilsmiðdepil er ein verkætlan, sum nakrir privatpersónar eru farnir í holt við. Men nú hevur Klaksvíkar býráð so samtykt at fara upp í ætlanina við at gera ein parkeringskjallara í miðdeplinum.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri sigur, at parkeringskjallarin er høvuðssorsøkin til, at kommunan fer upp í verkætlanina.

Røddir hava annars verið frammi um, at veruliga orsøkin til, at kommunan fer upp í, er fyri at handilsmiðdepulin, sum er ein íløga upp á útivið 90 milliónir krónur, tá hon er liðug, skal kunna gerast veruleiki. Men borgarstjórin leggur sum sagt dent á, at kommunan fer so at siga einans uppí ætlanina fyri at parkeringsviðurskiftini í miðbýnum ikki skulu gerast ein trupulleiki, tá miðbýarætlanin er framd.

– Okkara partur í hesari ætlanini kemur at liggja upp móti teimum 20 milliónunum, men tað haldi eg ikki er ov nógv, tá hugsað verður um, hvussu stór íløgan er alt í alt, sigur borgarstjórin.

Parkeringskjallarin kemur at hava 150 parkeringspláss. Steinbjørn sigur, at nógvar íbúðir eru tengdar at ætlanini um handilsmiðdepulin, og er ætlanin hjá kommununi, at fólk, sum fara at búgva í íbúðunum skulu kunna keypa eitt parkeringspláss í kjallaranum. Harumframt heldur hann, at ein tílíkur parkeringskjallari kann fara at koma væl við við atliti til tann nýggja mentanarmiðdepulin, sum eisini er í miðbýarætlanini hjá Klaksvíkar kommunu.

– Vit kunnu siga, at vit eru upp á forkant. Tað eru nógvar ætlanir í umbúnað í miðbýnum, og vit gera hetta fyri ikki at renna okkum í trupulleikar á parkeringsøkinum, tá miðbýurin er broyttur, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.



**Í 1910, sama ár, sum altjóða kvinnudagurin sá dagsins ljós, byrjaði Haraldur Joensen virksemi sítt í lítlu smiðjuni á Bakka. Lítið grunaði hann, at ein langabbadóttur hansara, fór at gerast verkfrøðingur, og verða eitt av álitunum í fyritøkuni og hjá snellumonnum í Føroyum. Gjáramorgunin, sjálvan kvinnudagin, hittu vit Eydnu Sandberg Mikkelsen á arbeiðsplássi hennara, Oilwind í Miðvági**

KVINNUDAGUR OG TÍÐIN
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*– Jamen, kann eg ikki sleppa at tosa við ein mann...*
*Hesa reaktiónina mátti Eydna við hvørt smyrja seg við, tá hon í 1982 byrjaði á verkstaðnum í fyritøkuni Oilwind, sum pápi hennara hevur tikið eftir pápa og abba sín. Men tað, sum Eydna ikki veit um snellur, er ikki vert at vita, og so við og við hava snellumenn sæð, at hon sanniliga veit, hvat hon tosar um*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Kvinnudagur og norðhavsróður

"Góðan dagin! Kanst tú stilla meg um til onkran, sum hevur við snellurnar at gera..."

Nú snellutíðin á Norðhavinum byrjar, er gravgangur á snelludeildina hjá Oilwind í Miðvági.

Menn hava riggað til bæði væl og leingi, og veðurtænastan hjá Landsverksfrøðinginum og heimasíðurnar hjá theyr.net og DMI verða dúgliga vitjaðar. Spenningur er á monnum og tað er umráðandi at snellurnar virka sum tær skulu.

Maðurin í telefonini verður stillaður um, og í hinum endanum svarar ein kvinnurødd.

– Eg bað um snelludeildina, sigur maðurin.

– Ja, hetta er snelludeildin, svarar hon fryntliga.

Maðurin ótolnast eitt sindur, men roynir at vera fólkaligur, tá hann greiðir damuni frá, hvat tað er hann hevur uppá hjartað. Tað er ein av teimum automatisku snellunum, sum ikki dregur sum hon skal, men tað nevnir hann ikki fyri henni, tað hevur hon ikki skil fyri kortini, heldur hann.

– Ja, hvat er, sum ikki virkar, spyr kvinnan.

– Jamen, kann eg ikki sleppa at tosa við ein mann...

Hesa reaktiónina mátti Eydna við hvørt smyrja seg við, tá hon í 1982 byrjaði á verkstaðnum í fyritøkuni Oilwind, sum pápi hennara hevur tikið eftir pápa og abba sín.

### Uppvaksin við teknikki

Men tað, sum Eydna ikki veit um snellur, er ikki vert at vita, og so við og við hava snellumenn sæð, at hon sanniliga veit, hvat hon tosar um.

Tað kemur eisini meira enn so fyri, at hon verður uppringd av norðhavinum, tá onkur útróðrarmaður hevur trupulleikar við snellunum.

Menn kunnu vera rættuliga heitir, tá teir ringja av fiskileiðini, tí hvat kann vera meira forargiligt, enn at liggja mitt í einum góðum kenni, við snellum, sum ikki virka.

Men tað er ikki bara snellum, Eydna hevur skil fyri. Tað hoyrist, at hon er á heimabana, tá hon errin sýnir fram nýggja framkomna línuspælið, sum skjótt kemur á marknaðin.

Eydna er uppvaksin við teknikki og var bert 18 ára gomul, tá hon fór niður at lesa til tekniskan atstøðing. Endamálið hjá henni var at vera á teknistovuni, men góði rækjufiskiskapurin í 80'unum dró mennirnar til skips, so verkstaðnum kom at mangla fólk.

Tað gjørdi, at hon fekk dreym sín uppfyltan, og var biðin at koma á verkstaðið at arbeiða. Seinni fór hon aftur til Danmarkar at lesa og varð útbúgvin verkfrøðingur í 1991.

Nú vita flestu kundarnir hjá Oilwind, at tað er eitt konufólk, teir skulu tosa við, so nú er eingin longur, ið biður um at sleppa at tosa við ein mann.

Eydna minnist, at tá hon byrjaði á verkstaðnum, var ein maður sum beint fram segði henni, at honum dámdi ikki, at hon var har.

– Hetta er okkara øki, segði hann.

Men Eydna varð verandi og hevur sanniliga prógvað, at hon dugir sítt handverk.

Tað var langabbi Eydnu, Haraldur Joensen, sum í 1910 byrjaði smiðjuvirki við tænastu til fiskimenn.

Lítið mundi hann ána, at lítla smiðjan við tíðini fór at menna seg og verða heimskend fyri sína framkomnu framleiðslu av fiskireiðskapi. Enn minni droymdi hann um, at ein langabbadóttir hansara fór at gerast verkfrøðingur og eitt av álitunum í fyritøkuni.

### Kvinnur í samtíðini

Hetta var júst sama árið, sum tað á eini kvinnuráðstevnu í Keypmannahavn varð samtykt, at altjóða kvinnudagur skuldi haldast hvønn 8. mars. Stigtakarin til kvinnudagin var ein týsk kvinna, ið kallaðist, Clara Zetkin.

Í fyrstu syftu var málið at fáa kvinnum valrætt, og at arbeiða fyri breyði og friði. Seinnu árini er dagurin nýttur til, millum annað at vísa á misjavna kynjabýtið í politikki og leiðandi størvum.

Millum fyriskipararnar av ráðstevnuni var Nina Bang, ið var fyrsta kvinna í heiminum, sum gjørdist ministari. Hetta hendi í 1924; tá vóru liðin 9 ár, síðani danskar kvinnur fingu valrætt á jøvnum føti við menn.

Tann 27. september 1915, atkvøddi Føroya Løgting fyri, at kvinnur skuldu fáa valrætt. Men lógin mátti samtykkjast í ríkisdegnum, áðrenn hon kundi setast í gildi í Føroyum; tað hendi á vári í 1916. Kvinnurnar máttu tó bíða til val var í 1918, tá tær á fyrsta sinni slupp at velja á einum politiskum vali.

Fara vit fram til dagin í dag og hyggja inn á heimasíðuna hjá Evropa-nevndini, síggja vit, at í 2004 verða nógv tiltøk, fyri at fremja leiklutin hjá kvinnum í Evropa.

Nógv er broytt, síðani kvinnur runt allan heim byrjaðu at stríðast fyri sínum rættindum. Eitt er vist lítið at ivast í; eingin okkara hevði ynskt seg aftur í ta tíðina, tá kvinnur vóru avskornar frá nógvum av tí, sum vit í dag taka sum eina sjálvfylgju.

Í dag er okkara samfelag soleiðis háttað, at kvinnur í veruleikanum hava somu møguleikar sum menn – tað er Eydna Sandberg Mikkelsen eitt gott dømi um.

### Fakta um Eydnu

Eydna Sandberg Mikkelsen er fødd og uppvaksin í Miðvági og er búsitandi í Havn.
Hon er dóttir Gurli og Bjarna Joensen.
Maður hennara eitur Michael.
Tey eiga børnini Ragnar og Margit.